# Brøndby er orduliga í hopla

**FCK sigraði fyri aðru ferð á rað, og í Århus er fótbóltslagið betri, enn tað hevur verið rættuliga leingi**



*Alvaro Santos hevur seinastu tíðina verið eykamaður hjá FCK, men sunnudain kom hann á vøllin og avgjørdi dystin móti FC Nordsjælland*

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Mál er tað sama sum undirhald í fótbólti. Í superliguni vórðu um vikuskiftið skorað 24 mál, og harvið var undirhaldsvirðið rættuliga høgt.

Brøndby legði seg leygardagin við 4-1 sigri í Herfølge á fremsta plássið. Tað varð roknað við, at hetta fór at vera fyribils inntil sunnudagin, tá ið næstu kappingarneytarnir aftur skuldu í eldin. Men Brøndby er framvegis oddalið, tí tey bæði, sum vóru tey næstu í kappingini, taptu sínar dystir.

Síðani næstseinasta sunnudag hava trý umfør verið í superliguni, og Brøndby hevur hvørja ferð víst sera hugflogsríkt fótbóltsspæl. Hesa ferð vóru teir í Herfølge, har heimaliðið serliga í 1. hálvleiki varð spælt sundur og saman. Herfølge er nú niðanfyri keðiligu strikuna.

Nummar trý, FCM, var sunnudagin í Århus og spældi móti nummar fýra, AGF. Fótbóltslagið í jyska høvuðsstaðnum er hópin betri nú, enn tað hevur verið í fleiri ár. Frá at vera botnlið, sum støðugt hevur verið í vanda fyri at flyta niður, og sum tað støðugt hevur verið nógvur turbolensur í og kring, er AGF nú har, sum tað er hugaligt at spæla og kappast. Mohammed Zidan legði FCM framum við fantastiska flottum máli, men AGF svaraði aftur og vann 2-1. Harvið er AGF nú á triðja plássinum, meðan FCM er á fjórða plássinum.

OB hevði sunnudagin møguleikan at endurvinna fremsta plássið. Eftir at teir høvdu vunnið sannførandi sigrar næstsíðsta sunnudag og mikukvøldið, vóru teir greiðir favorittar móti AaB, sum telist millum botnliðini. Men tað gekk heilt øðrvísi. AaB var ikki komið til Odense fyri at grava seg niður í vónini um, at tað skuldi eydnast at fáa eitt stig. Frá fyrsta bríksli fóru aalborgensarnir langt fram á vøllin, og teir vunnu 3-1. Harvið eru teir fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum omanfyri niðurflytingarstrikuna, men tað er ógvuliga tætt millum tey aftastu.

## Tungi endin

Randers er framvegis aftast, men nú hava teir fingið gongd á bæði málskjótingina og stigaheystingina. Hesa ferð høvdu teir vitjan av Silkeborg. Uppgerðin millum uppflytararnar endaði við 4-3 heimasigri. Hetta var fyrsta ferðin í hesum kappingarárinum, at tað eydnaðist hjá Randers at skjóta mál á heimavølli, og so var tað ikki við mýkindum, at teir fóru fram.

Silkeborg er framvegis omanfyri niðurflytingarstrikuna, men teir fara skjótt longri niður á talvuni, um gongdin ikki fer at venda. Teir hava einki fingið burturúr fimm teimum seinastu umførunum. Teir vunnu tríggjar tær fyrstu ferðirnar, eftir fýra umfør høvdu teir tíggju stig, og síðani hava teir einki fingið fimm tær seinastu ferðirnar.

Eitt annað felag, sum úrtøkan hevur verið rættuliga soltin hjá, er Esbjerg. Síðsta kappingarár vóru teir við í stríðnum um meistaraheitið. Nú hava teir bara fingið tíggju stig burturúr níggju teimum fyrstu umførunum. Hesa ferð vóru teir í Viborg, har heimaliðið legði seg á odda, tá ið 26 sekund vóru farin. Viborg vann 2-0, og hetta var sjeynda ferðin á rað, at Esbjerg ikki vann á útivølli.

Í FCK er lagið batnað síðstu dagarnar. Sunnudagin vóru teir í Farum, og tá spældu teir væl í 1. hálvleiki. Teir høvdu fleiri góðar málmøguleikar. Zuma hevði nakrar, men tað gongur framvegis illa hjá honum at finna leiðina til meskarnar. Saman við Zuma var Peter Møller í FCK álopinum. Hann fekk góðan møguleika burturúr ongum, men royndin fór dygst omanfyri tvørtræið.

Norski miðvallarin, Magne Hoseth, átti næstsíðsta fótin í einasta málinum í 1. hálvleiki. Dómarin skrásetti málið at vera sjálvmál. Beinanvegin eftir steðgin varð Zuma útskiftur við Jesper Bech. Fyri FCK var tað vátur vøttur, at FCN við stútara javnaði til 1-1, tá ið 50 minuttir vóru farnir. Tað tóktist sum um, at liðini skuldu fáa eitt stig í part. Men tá ið tað restaðu tríggir minuttir, skoraði Álvaro Santos sigursmálið fyri FCK. Álvaro var komin á vøllin, tá ið eitt korter var eftir, og hann fekk málið burturúr ongum.

Leygardagin fer FCK at fáa vitjan av Herfølge. Sunnudagin sær skráin soleiðis út: OB-Viborg, Esbjerg-AGF, FCM-FCN, AaB-Silkeborg og Brøndby-Randers.

**Danska superligan**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brøndby (S) | 9 | 5 | 3 | 1 | 14 | 6 | 8 | 18 |
| 2 OB | 9 | 5 | 1 | 3 | 20 | 13 | 7 | 16 |
| 3 FCM | 9 | 5 | 1 | 3 | 13 | 13 | 0 | 16 |
| 4 AGF | 9 | 4 | 2 | 3 | 15 | 10 | 5 | 14 |
| 5 Viborg | 9 | 4 | 2 | 3 | 10 | 9 | 1 | 14 |
| 6 FCK (M) | 9 | 3 | 4 | 2 | 15 | 15 | 0 | 13 |
| 7 FC Nordsj. | 9 | 3 | 2 | 4 | 10 | 14 | -4 | 11 |
| 8 Esbjerg | 8 | 3 | 1 | 4 | 17 | 14 | 3 | 10 |
| 9 AaB | 9 | 3 | 1 | 5 | 14 | 12 | 2 | 10 |
| 10 Silkeborg | 9 | 3 | 1 | 5 | 17 | 19 | -2 | 10 |
| 11 Herfølge | 9 | 3 | 1 | 5 | 10 | 19 | -9 | 10 |
| 12 Randers FC | 8 | 2 | 1 | 5 | 7 | 18 | -11 | 7 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

**Danska 1. deild**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HIK | 9 | 6 | 2 | 1 | 20 | 9 | 11 | 20 |
| 2 Frem | 9 | 5 | 3 | 1 | 14 | 5 | 9 | 18 |
| 3 AC Horsens | 9 | 5 | 2 | 2 | 16 | 10 | 6 | 17 |
| 4 Køge | 9 | 4 | 4 | 1 | 24 | 13 | 11 | 16 |
| 5 Fredericia | 9 | 4 | 3 | 2 | 18 | 10 | 8 | 15 |
| 6 Vejle | 9 | 5 | 0 | 4 | 24 | 22 | 2 | 15 |
| 7 Sønderjyske E | 9 | 4 | 2 | 3 | 19 | 12 | 7 | 14 |
| 8 Fremad Amager | 8 | 4 | 2 | 2 | 15 | 8 | 7 | 14 |
| 9 Skjold | 8 | 4 | 2 | 2 | 16 | 12 | 4 | 14 |
| 10 AB | 9 | 4 | 1 | 4 | 17 | 17 | 0 | 13 |
| 11 NFA | 9 | 3 | 3 | 3 | 23 | 19 | 4 | 12 |
| 12 Brønshøj | 8 | 2 | 2 | 4 | 15 | 21 | -6 | 8 |
| 13 Næstved | 9 | 1 | 2 | 6 | 8 | 19 | -11 | 5 |
| 14 Ølstykke | 9 | 1 | 2 | 6 | 8 | 27 | -19 | 5 |
| 15 B 93 | 9 | 0 | 4 | 5 | 10 | 25 | -15 | 4 |
| 16 Dalum | 8 | 1 | 0 | 7 | 11 | 29 | -18 | 3 |

Føroyskir leikarar: Gunnar Nielsen Jón Rói Jacobsen (Frem), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

**Danska 2. deild**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brabrand | 8 | 6 | 1 | 1 | 26 | 13 | 13 | 19 |
| 2 Slagelse | 8 | 5 | 2 | 1 | 16 | 9 | 7 | 17 |
| 3 Jetsmark | 8 | 5 | 2 | 1 | 18 | 13 | 5 | 17 |
| 4 Kolding FC | 8 | 5 | 0 | 3 | 17 | 13 | 4 | 15 |
| 5 Næsby | 8 | 4 | 1 | 3 | 12 | 10 | 2 | 13 |
| 6 Holbæk | 8 | 4 | 1 | 3 | 12 | 11 | 1 | 13 |
| 7 Glostrup | 8 | 4 | 1 | 3 | 18 | 18 | 0 | 13 |
| 8 B 1909 | 8 | 4 | 1 | 3 | 10 | 10 | 0 | 13 |
| 9 B 1913 | 8 | 3 | 2 | 3 | 15 | 13 | 2 | 11 |
| 10 Lyngby | 8 | 3 | 1 | 4 | 14 | 13 | 1 | 10 |
| 11 Roskilde | 8 | 3 | 0 | 5 | 9 | 15 | -6 | 9 |
| 12 Kalundborg | 8 | 2 | 2 | 4 | 16 | 18 | -2 | 8 |
| 13 Holstebro | 8 | 2 | 2 | 4 | 11 | 13 | -2 | 8 |
| 14 Hjørring | 8 | 2 | 2 | 4 | 9 | 13 | -4 | 8 |
| 15 Aarhus Fremad | 8 | 1 | 2 | 5 | 12 | 15 | -3 | 5 |
| 16 Værløse | 8 | 1 | 0 | 7 | 7 | 25 | -18 | 3 |

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby)



# Dream-Team sigraði



*Manningin á myndini er aftast frá vinstri: Bent Tommy Linklett, Niclas Joensen, Kári Nielsen, Jónleif Sólsker, Árni Arge, Gunnar Mohr, Regin Nolsøe, Bjarki Mohr og Bjarni Jakobsen.*
*Fremst frá vinstri:Leivur Holm, Heðin Joensen, Kaj Leo Johannesen, Uni Arge, Heðin Askam, Bjarki Ellefsen og Sámal Erik (Bagge) Hentze.*
*Andreas F. Hansen, Ingi Rasmussen, Niels Pauli Jacobsen, Marni Mortensen og Høgni í Stórustovu vanta á myndini*

**HB gjørdist leygardagin føroyameistari, tá gomlu kempurnar í felagnum tókust við líkarnar úr Gøtu**

FÓTBÓLTUR
*HB-leikararnir skriva*

Dysturin endaði 1-1 eftir at GÍ var komi á odda miðskeiðis í fyrra hálvleiki við einum málið sum Magni Jarnskor gjørdi eftir flot og gott uppspæl av gøtumonnum. Fyrri hálvleikur var nøkulunda javnur við Gí sum tað meira stýrandi liðið.

10 min. inn í seinna hálvleik javnaði Uni Arge eftir at máverjin skeyt eitt málspark út á miðan vøll har Uni smekkaði til beinanvegin og í málið.

Hóast GÍ átti at kalla allan seinna hálvleik, so megnaðu teir ikki at avgera dystin, og tá heldur einki mál kom í umdystinum, mátti brotssparkskapping til.

Hesa vann HB við 3-1, og so var rómurin øgiligur á monnum. Fyri HB skorðaðu Uni Arge, Gunnar Mohr og Niclas Joensen, meðan Magni Jarnskor var einasti á GÍ-liðnum, sum var nóg kaldur í tvídystinum við sambandsformannin í HB-málinum.

## Nostalgi

Fyri okkum á HB liðinum var tað eitt gamalt lið (tá hugsa verður um aldurin) sum vit møttu. Allar dystirnar í ár hava vit veri umleið 15 ár eldri enn mótstøðuliðini í miðal, men í gjár var okkara meðalaldur bert eini 4-5 ár hægri.

Tað stuttliga hesaferð var, at tað vóru so nógvir fyrrverandi føroyameistarar og steypavinnarar úr 1. deild á liðinum. Líka frá Kára Nielsen í 1978 og til 2002 har Uni var við til at vinna meistaraheitið til HB. Hjá GÍ vóru Magnus Greggersen (1983 og 84), Magi Jarnskor, Pauli Jarnskor, Rúni Justinussen, Alvi Justinussen, Janus Rasmussen, Jóan Petur Olsen og aðrir í vunnu fýra ár á rað í 90`unum. Hjá HB vóru Bjarki Mohr og Niclas Joensen sum vunnu við B71 í 1989. Hinir sum vóru við at vinna í 78, 81, 82, 88, 90, 98 og 2002 kunnu síggjast á myndini.

Steypið sum bleiv handa var givið av Christian Olsen í Klaksvík í 1984, HB vann tað fyri fimtu ferð so tað bleiv til ognar.

4. deildarliðið hjá HB sum eisini verður kalla »the dream team« av 1. deildarleikarnum í dag, hava haft eitt gott ár í ár. 11 dystir 11 sigrar í landskappingini.

# GÍ hevur gallaveitslu

Fótbóltsgallaveitslan 2004 verður í mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið 16 oktobur kl. 19.30

Aftur í ár verður tað GÍ, sum fer at skipa fótbóltsgallaveitsluni. Umframt, at hetta er eitt høvi hjá leikarum og øðrum við tilknýti til liðini at hittast undir øðrvísi umstøðum, so er talan sjálvandi eisini um tiltakið, har ársins leikarar og venjarar skulu kjósast.

Hetta seinasta verður avgjørt við atkvøðugreiðslu, har venjarar og liðformenn á ymsu liðunum geva sína atkvøðu.

**-jm**

# HB vann dreingjadeildina

Í meistarabólkinum í dreingjadeildini varð seinasta umfar leikt leygardagin. Her eydnaðist HB at gerast føroyameistarar, og sum um tað ikki var nóg mikið, so merkti hetta eisini, at dreingirnir hava vunnið greipuna. Fyrr í ár vunnu teir nevnliga kappingina um nýggja blaðberarasteypið.

Í seinasta dystinum vann HB á heimavølli 3-1 móti NSÍ.

Bert eina ferð í ár hevur HB leikt javnt, meðan allir hinir dystirnir eru vunnir, so einki er at ivast í, at talan var um eitt uppiborið meistaraheitið hjá dreingjunum.

**-jm**

## Komandi dystir

**1. deild menn**
02.10 B36-B68
02.10 EB/S-Skála
02.10 KÍ-ÍF
02.10 GÍ-VB
02.10 NSÍ-HB

**2. deild menn**
02.10 B36-B71
02.10 TB-VB
02.10 Sumba-Royn
02.10 FSV-AB
02.10 KÍ-LÍF

**3. deild menn**
02.10 Fram-B68
02.10 EB/S-Skála
02.10 SÍ-ÍF
02.10 GÍ-TB
02.10 NSÍ-HB

## Máltindurin

adidas

| | | |
|---|---|---|
| Sonni L. Petersen | EB/S | 11 |
| Súni Olsen | GÍ | 11 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 11 |
| John Petersen | B36 | 8 |
| Heine Fernandez | HB | 8 |
| Jacob Bymar | KÍ | 8 |
| Bogi Gregersen | Skála | 8 |
| Jonhard Frederiksberg | Skála | 8 |
| Høgni Zachariassen | ÍF | 7 |
| Egil á Bø | B36 | 6 |
| Anderson | B68 | 6 |
| Sorin Anghel | EB/S | 6 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 6 |
| Heðin á Lakjuni | HB | 6 |
| Erling Fles | KÍ | 6 |
| Jákup á Borg | HB | 5 |
| Rúni Nolsøe | HB | 5 |
| Milan Kulic | VB | 5 |
| Magni á Lakjuni | ÍF | 4 |
| Ian Højgaard | NSÍ | 4 |
| Nenad Stankovic | Skála | 4 |
| Mindaugas | VB | 4 |

**1. deild menn**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 17 | 12 | 4 | 1 | 45 | 16 | 29 | 40 |
| 2 B36 | 17 | 9 | 4 | 4 | 31 | 19 | 12 | 31 |
| 3 Skála | 16 | 8 | 3 | 5 | 30 | 21 | 9 | 27 |
| 4 KÍ | 17 | 5 | 8 | 4 | 22 | 22 | 0 | 23 |
| 5 GÍ | 17 | 6 | 5 | 6 | 29 | 31 | -2 | 23 |
| 6 EB/Streymur | 16 | 6 | 4 | 6 | 26 | 22 | 4 | 22 |
| 7 VB | 17 | 6 | 4 | 7 | 23 | 22 | 1 | 22 |
| 8 NSÍ | 16 | 6 | 3 | 7 | 24 | 22 | 2 | 21 |
| 9 ÍF | 17 | 3 | 3 | 11 | 23 | 48 | -25 | 12 |
| 10 B68 | 16 | 2 | 2 | 12 | 15 | 45 | -30 | 8 |

**2. deild menn**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 17 | 11 | 2 | 4 | 45 | 24 | 21 | 35 |
| 2 B71 | 17 | 11 | 2 | 4 | 48 | 30 | 18 | 35 |
| 3 AB | 17 | 10 | 2 | 5 | 30 | 23 | 7 | 32 |
| 4 LÍF | 17 | 8 | 4 | 5 | 30 | 28 | 2 | 28 |
| 5 FSV | 17 | 8 | 3 | 6 | 54 | 36 | 18 | 27 |
| 6 Royn | 17 | 8 | 1 | 8 | 38 | 39 | -1 | 25 |
| 7 Sumba | 17 | 6 | 4 | 7 | 24 | 30 | -6 | 22 |
| 8 B36 | 17 | 5 | 3 | 9 | 27 | 45 | -18 | 18 |
| 9 KÍ | 17 | 3 | 3 | 11 | 26 | 39 | -13 | 12 |
| 10 VB | 17 | 1 | 4 | 12 | 18 | 46 | -28 | 7 |